Álit

í

løgtingsmáli nr. 37/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Eftirbataheim verður strikað, hækking av heilsutrygdargjaldi úr 0,60% til 0,70%, broyting av tilskotsstiganum og broyting um hjálparráð)

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, hevur lagt málið fram 30. september 2020, og eftir 1. viðgerð 9. oktober 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. oktober og 3. og 24. november 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri MEGD saman við Sinnisbata, Javna og Diabetesfelagnum, Landsfelag Pensjonista, Sjúklingaráðið, Fakfelagssamstarvið saman við Samtaki, og við landsstýrismannin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen saman við Heilsutrygd.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Edva Jacobsen, Erhard Joensen og Jóhan Eli Poulsen) heldur, at skipanir í Heilsutrygd eiga at verða endurskoðaðar, fyri at tryggja at skipanirnar virka eftir ætlan, og soleiðis at neyðugu tillagingarnar verða gjørdar.
Í hesum sambandi kundi Kommunulæknaskipanin verið endurskoðað. Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur kundi verið eftirhugt. Eisini kundi skipanin viðvíkjandi heilivági og reseptum verið eftirhugd, fyri at tryggja, at hetta verður gjørt so skynsamt sum tilber - eisini fíggjarliga.

Meirilutin setir fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis:
   "(Eftirbataheim verður strikað, hækking av heilsutrygdargjaldi úr 0,60% til 0,70% og broyting um hjálparráð)"

2. Í § 1, nr. 2 verður í § 10, stk. 1 "§ 10," strikað.

3. § 1, nr. 3 verður strikað.
   § 1, nr. 4-7 verður eftir hetta § 1, nr. 3-6.

4. § 1, nr. 4, sum verður § 1, nr. 3, verður orðað soleiðis:
   "Øll, sum hava fylt 18 ár og sum eru fevnd av hesi løgtingslóg, gjalda 175 kr. um mánaðin, umframt 0,70% av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd."

5. § 1, nr. 5, sum verður § 1, nr. 4, verður orðað soleiðis:

> "Avgerðir tiknar av Landsapotekaranum ella Hjálparráðsnevndini sambært hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið boð um avgerðina."

Viðmerkingar:
Til nr. 1:
Frágreiðandi heitið verður broytt samsvarandi broyting nr. 3 í hesum áliti.

Til nr. 2:
Teknisk broyting. Tað er ikki neyðugt at frámerkja § 10 í § 10.

Til nr. 3:
Broytingin av tilskotsstiganum verður strikað. Verðandi tilskotsstigi verður varðveittur. Við hesi broyting verður metta sparingin á Fíggjarlógini upp á 8 mió. kr. ikki framd.

Til nr. 4 og 5:
Teknisk broyting. Tá stk. 1 verður orðað av nýggjum, skal greinin ikki setast frammanfyri.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir og Aksel V. Johannesen) mælir staðiliga frá at samtykkja uppskotið við hesum viðmerkingum.

Heilsutrygdarskipanin hongur væl saman fíggjarliga. Tøl frá Heilsumálaráðnum vísa, at seinastu fimm árini hevur inntøkuvøksturin hjá Heilsutrygd verið størri enn útreiðsluvøksturin, sí talvur niðanfyri, frá Heilsumálaráðnum, sum eru sendar Fíggjarnevndini.

Útreiðsluvøksturin:

Heilsutrygdarveitingar, 1.000 kr.						
Roknskapur 2014	Roknskapur 2015	Roknskapur 2016	Roknskapur 2017	Roknskapur 2018	Roknskapur 2019	Árlig broyting í miðal 2014-2019
155.250	156.009	162.050	165.453	176.384	191.640	**4,7%**

Inntøkuvøksturin:

Heilsutrygdargjald 1000 kr.						
Roknskapur 2014	Roknskapur 2015	Roknskapur 2016	Roknskapur 2017	Roknskapur 2018	Roknskapur 2019	Árligur miðalvøkstur 2014-2019
121.369	127.529	140.438	144.433	148.116	153.589	**5,3%**

Síðani løgtingsvalið hevur sitandi meiriluti i Løgtinginum økt raksturin hjá landinum við á leið 600 mió. kr., samstundis sum hesin meirilutin hevur lækkað inntøkurnar við meira enn 100 mió. kr. Á henda hátt hevur sitandi meiriluti megnað at søpla eitt yvirskot á slaka hálva mia. í 2019 til eitt undirskot í 2020. Millum annað hevur meirilutin lækkað tilfeingisgjøldini við 54 mió. kr.

Minnilutin heldur tað hvørki verða rætt ella rímiligt at geva stórar lættar til nøkur fá stór reiðarí, sum hava havt 100-tals mió. í vinningi samanlagt seinastu árini, fyri síðan at senda rokningina til familjurnar, pensjonistarnar og verkafólkið.

Minnilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 2. desember 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Edva Jacobsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen